Álit

í

løgtingsmáli nr. 105/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (Øktur barnafrádráttur í landsskattinum)

Bárður á Steig Nielsen, Beinir Johannesen og Jenis av Rana, løgtingsmenn, hava vegna ávikavist Sambandsflokkin, Fólkaflokkin og Miðflokkin lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð 20. mars 2024 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 2., 18. og 23. apríl 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Landsbankan og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu og Hanna Jensen) viðurkennir, at ein øktur barnafrádráttur kann gera mun í gerandisdegnum hjá barnafamiljum í Føroyum.

Ein avbjóðing við barnafrádrátti er tó, at hann er líka stórur hjá teimum við stórum fíggjarligum rásarúmi, sum hjá teimum við avmarkaðum fíggjarligum rásarúmi.

Tað er í andsøgn við politikkin hjá samgonguni, sum hevur sum part av samgonguskjalinum at lætta um hjá teimum fíggjarliga sperdu. Tí metir meirilutin, at tað vendir meira rætt at gera skattalættan, sum samgongan hevur framt, umframt tær betringar, ið verða gjørdar í barsilsskipanini.

Meirilutin skal ikki avvísa, at tað kunnu vera átøk í barnafrádráttinum, sum kunnu geva meining, tá hugsað verður um lækkandi burðartalið í Føroyum. Serliga um talan var um barnafrádráttin hjá børnum, sum eru undir 7 ár. Hetta uppskotið, ið sambært viðmerkingunum er mett at kosta 23 mió. kr., er tó heilt ófíggjað, og tað verður ikki mett nøktandi, havandi fíggjarligu støðuna hjá landskassanum og langtíðarhaldførisavbjóðingina í huga.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Seinasta tíðin hevur verið nógv merkt av príshækkingum. Gongdin hevur verið ógvislig, og enn hækka prísirnir nógv. Umframt tað, so hava avgjaldshækkingar eisini rakt føroysku familjurnar, og gjørt tær enn meir fíggjarliga sperdar.

Minnilutin heldur tí, at neyðugt er at geva barnafamiljum eitt lyft. At hækka barnafrádráttin er eitt átak, ið rakar væl, tí tað fevnir um allar barnafamiljur.

Í skattaumskipanini, ið varð framd fyri jól, duttu tey lágløntu niðurímillum, orsakað av hækkandi avgjøldum, og vísti landsstýrið eisini á hetta í viðmerkingunum til løgtingsmál nr. 43/2023 um orkuískoyti.

Hetta uppskotið tryggjar øllum barnafamiljum, eisini lágløntum, ein fíggjarligan styrk. Sum dømi kann nevnast, at ein familja við trimum børnum undir skúlaaldur fær 6.000 kr. meira at liva fyri um árið við hesum uppskotinum.

Tá tað umræður fígging av uppskotinum, so vil minnilutin vísa á, at tær grønu stuðulsskipanirnar verða útfasaðar tey komandi árini. Meirinntøkan av hesum dekkar kostnaðin av hesum uppskoti, og væl meir enn tað. Tí skuldi fíggingin ikki verið ein trupulleiki, so leingi man heldur fast við at útfasa hesar sum ætlað.

Burðartalið hevur verið fallandi síðstu tíðina. Hvør orsøkin til tað er, er torført at siga. Tó skal tann fíggjarligi parturin ikki vera ein forðing, og er hetta uppskotið eitt stig rætta vegin.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 2. mai 2024

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	